Á SKEIVA BEININUM



*Thomas Rasmussen fekk gullmerki í einmansleiki í borðtennis*

# Reytt og svart og einki annað

*Eyðun/Jens Kr.*
*eydun@sosialurin.fo*

**Sandwick:** Borðtennisspælarar íðka sín ítrótt við einari batt í hondini. Teir sláa, temja og smasja við hesum runda skapilsi, sum er reytt á aðrari síðuni og svart á hinari síðuni.

Men meðan tað er vanligt í øllum øðrum ítróttargreinum at velja sær sínar egnu litir á útgerðini, um tað so eru skógvar, troyggjur, hosur, hár ella bogar, so er tað eitt sindur øðrvísi í borðtennis.

Thomas Rasmussen var ein av føroysku borðtennisspælarunum á Oyggjaleikunum í Hetlandi.

*Thomas, hví er battið altíð reytt á aðrari síðuni og svart á hinar síðuni?*

– Tað er tí, at tú skalt kenna mun á yvirflatuni á battinum. Tilfarið er ikki tað sama á báðum síðunum, so tú skal síggja mun á, hvørjum hann slær við.

*Er tað neyðugt at síggja mun á, hvørjari síðu hann slær við?*

– Ja, tí at summir spælarar spæla við knobbum á aðrari síðuni, og tí er tað umráðandi, at tú ikki verður snyttur, men sært hvørjari síðu hann slær við. Tað er ymiskt, hvussu skrúvan er á bóltinum, alt eftir hvørjari síðu hann slær við. Í finaluni var hetta ikki so týdningarmikið, tí hann spældi heilt frammi við borðið alla tíðina, men tá ið spælarar spæla longur burtur frá borðinum, ger tað mun, hvørjari síðu hann slær við.

*Hvat so, um tú skuldi havt hug at spælt við einum gulum og reyðum batti?*

– Nei, tað gongur ikki. Tey verða slettis ikki gjørd í teimum litunum. Tú fært eisini bláar og grønar battir, men øll spæla við svørtum og reyðum.

*Hvussu nógv batt hevur tú við til Oyggjaleikirnar?*

– Eg havi mítt egna við, og so havi eg lánt tað hjá pápu mínum eisini. Hann spælir við sama trænum, sum eg brúki. Eg havi tað við sum eyka, um mítt skuldi brotna ella blivið burtur, men eg spældi allatíðina við mínum batti.

*So pápi tín spælir eisini borðtennis?*

– Ja, hann spælir í sama felag sum eg, og vit spæla tvímansleik saman. So vit spæla nakrar góðar dystir við familjuskeldi og tí heila…

*Hvat kostar eitt batt?*

– Eini 500 ella 600 krónur.



*Aksel Poulsen fekk silvur í einmansleiki í badminton*

# Venjarin var nøgdur við úrslitið

**Fyri fyrstu ferð eydnaðist tað føroyska badmintonliðnum at vinna tvey heiðursmerki til Oyggjaleikirnar. Venjarin var nøgdur við úrslitið, hóast hann iðraði seg eitt sindur um, at tað ikki gjørdist til eitt gullmerki í einmansleikinum**

BADMINTON
*Eyðun/Jens Kr.*
*eydun@sosialurin.fo*

**Lerwick:** Føroyska badmintonliðið fekk sítt besta úrslit á Oyggjaleikunum í Hetlandi.

Ragnar Rasmussen vann bronsu í einmansleikinum, og Aksel Poulsen vann silvur, eftir at hann tapti finaluna ímóti grønlendska Bror Madsen, sum eisini hevði sent Bjart Lamhauge og Ragnar Rasmussen úr kappingini.

Liðið hjá føroyingunum endaði sum nummar 5 í kappingini.

– Eg eri sera væl nøgdur við hesa kappingini. Fyriskipanin hevur verið góð, og úrslitið hjá okkum er eisini fínt. Vit fingu tvey heiðursmerki, og tað er fyrstu ferð, at Føroyar hava klárað tað. At vit so ikki fingu eitt gullmerki til seinast, var keðiligt, men samanumtikið var úrslitið gott, segði venjarin hjá føroyingunum, Jonas Gai.

## Iðraði seg um finaluna

Aksel Poulsen hevði eina góða kapping, og hann hevði møguleikan fyri gulli í einmansleikinum, tá ið hann kom í finaluna. Har eydnaðist tað tó ikki at vinna.

– Aksel helt seg væl til ætlanin, sum vit høvdu lagt. Aksel skuldi royna at spæla Bror runt á vøllinum, og tað gekk heilt væl. Bror sló rættiliga væl, og hann kom nær linjunum alla tíðina. Aksel sló eitt sindur ov langt til tíðir, men hann helt seg til ætlanina. Tað var bara ikki nóg mikið í dag, segði Jonas Gai.

– Bror ger eitt sindur færri feilir enn Aksel, og tí vinnur hann. Tá ið Aksel klárar at spæla hann runt á vøllinum, so vinnur Aksel eisini bóltarnar. Men tíverri so gjørdi Aksel ov nógv mistøk í dag.

Tað tykist sum Føroyar hava fleiri góðar og spennandi badmintonspælarar í løtuni, og á Oyggjaleikunum fáa teir hóskandi avbjóðingar.

– Oyggjaleikirnir passa væl til føroyskt badminton. Støðið er soleiðis, at vit kunnu vera við, og vit kunnu spæla upp ímóti teimum flestu oyggjunum. Vit fingu eitt fimta pláss í liðkappingini, men um vit høvdu fingið møguleikan at spæla ímóti Grønlandi ella Hetlandi, sum vóru frammanfyri okkum, so rokni eg við, at vit kundu fingið eitt gott úrslit, helt venjarin.